# Eyka fundur í Hvalbiar sóknar kommunu hin 01. juni 2015.

Møttir vóru: Trúgvi Gudmundarson, Rúni Thomsen, Eyðfinn Debes, Magni Berhholdsen, Martin í Nesi, Niels Pauli Hammer og Niels Olaf Eyvindsson. Niels J. Thomsen og Jóhan Eli L. Poulsen vóru burturstaddir.

Fundurin varð settur kl. 18.30.

1. **Ársroknskapur 2014 til góðkenningar.**
   Ársroknskapurin hjá Hvalbiar Sóknar kommunu fyri 2014 til góðkenningar. Fíggjarnevndin hevur gjøgnumgingið roknskapin og mælir bygdarráðnum til at góðkenna hann. Inntøkurnar eru t.kr. 20.473, rakstrarútreiðslur t.kr. 17.101 og løguútreiðslur t.kr. 1.326. Roknskapurin gevur eitt avlop á t.kr. 2.046. Samtykt varð einmælt at góðkenna roknskapin.

2. **Starvsfólkaskipan / roknskaparreglur fyri Hvalbiar Kommunu (2. viðgerð).**
   Samtykt varð einmælt at taka undir við Starvsfólkaskipanini og Roknskaparreglugerðini fyri Hvalbiar Kommunu.

3. **Fíggingin í sambandi við bygging av barnagarði til umrøðu.**
   Í sambandi við m.a. bygging av barnagarði, hevur Fíggjarnevndin havt fund um fígging av hesari og øðrum íløgum. Fíggjarnevndin mælir til, at bygdarráðið roynir at finna sparingar í rakstrinum og koma við viðmerkingum hesum viðvíkjandi. Samtykt varð at fylgja tilmælinum frá nevndini.

Fundarbókin lisin og skrivað undir.                Fundur lokin kl. 19.30.